# Í lagi at keypa upsa

Svenska blaðið Dagens Nyheter hevur gjørt ein lista til lesararnar yvir fiskasløg, sum verða góðkend sum søluvøra. Blaðið viðmælir, at upsi kann keypast heldur enn toskur. Og tó. Er toskurin veiddur í Barentshavinum ella undir Íslandi, er tað í lagi. Fiskaslagið Hoki úr Ný Sælandi, Suðurafrika ella Suðuramerika er eisini góðkendur sum søluvøra. Sama er við polloki úr Alaska. Blaðið heldur eisini, at skal makrelur keypast, skal hann helst vera svenskur.



# Havnin flýtur í lorti

**Tórshavnar Kommuna hevur álvarsligar trupulleikar við at lyfta uppgávuna at tøma rottangar og reinsiverk í kommununi. Bert ein bilur er til alla kommununa, og tíðin strekkir ikki til annað enn bráðfeingistøming**

UMHVØRVI

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Bert hesin eini bilurin er til at røkja alla rottanga- og reinsiverkstøming í allari Tórshavnar Kommunu. Tíðin røkkur ikki til annað enn bráðfeingistømin í løtuni, og fyri hvønn dag, su mgongur, veksur trupulleikin*

Tað er nakað lort. Á heimasíðu sínari skrivar Tórshavnar Kommuna, at hon hevur gjørt eina skipan, har rottangar, reinsiverk og annað verða tømd einaferð um árið. Men kommunan megnar ikki at lyfta hesa uppgávuna við verandi støðu, og rottangatømingin verður als ikki røkt á nøktandi hátt.

Sum er nú, hevur Tórshavnar Kommuna bert ein bil til at tøma allar rottangarnar og øll reinsiverkini í kommununi.

Lyftið um at rottangar og reinsiverk verða tømd einaferð um árið verður als ikki hildið. Sum er nú er bert orka til at røkja bráðfeingistøming, har fólk ringja inn og boða frá at rottangin er yvirfyltur. Millum seks og sjey fólk ringja um dagin, og tískil er millum lítil og eingin tíð til yvirs at røkja rottangatømingina runt í kommununi.

## Koma ikki uppundan

Teir, ið standa fyri rottangatømingini vátta, at tað í løtuni er vónleyst at røkja ta álagdu uppgávuna, og tað við einum bili ikki letur seg gera at tøma tangarnar oftari. Sum er nú kunnu ganga upp til fimm ár millum at rottangin verður tømdur, um ikki at tað typpist, og fólk verða noydd at boða frá hesum sum eitt bráðfeingismál.

Til tíðir hevur IRF hjálpt til við at tøma rottangar í Tórshavnar Kommunu, men tá stingur ein annar trupulleiki seg upp, nevnliga móttøkan í Húsahaga.

Tá IRF hevur hjálpt til, megnar móttøkan ikki at taka alt rotið, og fyllist.

Tískil letur tað seg ikki gera at koma uppundan við rottangatømingini, og stundir eru bert til at røkja bráðfeingisuppgávur.

Tórshavnar Kommuna er vaksin sera skjótt seinnu árini. Umframt nógvu nýggju sethúsini og bygningarnar í Tórshavn, eru eisini Kollafjørður, Nólsoy, Velbastaður, Kirkjubø og Hestur komin afturat kommununi. Men kommunan tykist ikki at verða vaksin við uppgávuni, og fyri hvønn dag, sum líður gerst hetta ein alsamt størri trupulleiki.

# Vita av trupulleikanum

**- Sum nú er, megnar kommunan ikki at lyfta hesa uppgávuna, ásannar Elin Lindenskov, ið er forkvinna í heilsu- og umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar Kommunu. Hon sigur, at arbeitt verður við málinum**

UMHVØRVI

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*- Vísir tað seg soleiðs, at tað er skilabest at keypa ein bil afturat, skal tað sjálvandi gerast. Men arbeitt verður við málinum, og henda uppgávan skal loysast. Kommunan skal megna at lyfta hesa uppgávuna, leggur Elin Lindenskov dent á*

Sum er nú, megnar Tórshavnar Kommuna ikki at lyfta lógarásettu skylduna um at rottangar skulu tømast regluliga. Elin Lindenskov er forkvinna í heilsu- og umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar Býráð, og hon váttar at støðan als ikki er nóg góð sum er, og at kommunan ikki megnar at lyfta uppgávuna, sum hon lovar borgarunum inni á heimasíðu sínari.

- Men Tórshavnar Kommuna skal megna tað. Vit mugu royna at finna útav, hvussu vit loysa henda trupulleikan. Sum er nú hava vit samstarvað við IRF um at teir hjálpa til við at tøma rottangarnar í kommununi. Men vit arbeiða við málinum. Tað er ikki sikkurt at tað at keypa ein tømingarbil afturat er besta loysnin. Tá kann jú verða, at bæði vit og IRF koma at hava stóra yvirskotsorku, sigur Elin Lindenskov.

Sambært Elini Lindenskov er gongd í málinum, men er hetta eitt ógvuliga stórt konsept, ið skal fáast uppá pláss.

- Her eru ógvuliga nógvir faktorar tengdir at hesum. Eitt er millum annað móttøkan, ið ikki megnar nóg væl at taka ímóti øllum avfallinum. Men har verður so eisini arbeitt við onkrum møguligum loysnum, millum annað einari skipan, har avfallið verður turkað og kann nýtast sum gjødningur. Men hetta er eisini tengt at so nógvum øðrum, millum annað tyrvingarplássinum á Glyvursnesi, sum hevur fingið drúgva politiska viðgerð, men sum nú er komið uppá pláss, greiðir Elin Lindenskov, forkvinna í heilsu- og umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar Kommunu, á.

## Ikki uppí IRF

Tórshavnar Kommuna megnar ikki sjálv at lyfta uppgávuna í løtuni, og hevur til tíðir biðið IRF um hjálp til at lyfta hana. Spurd, um tað ikki hevði verðið líka lætt at farið uppí IRF, er Elin Lindenskov ósamd.

- Tað er ikki ein loysn hjá okkum at fara uppí IRF. Tað vildi verðið ógvuliga trupult. Men ein møguleiki, og kanska tann besta loysnin var, um man stovnaði eitt nýtt felag saman, sum fevndi um allar kommunurnar. Sum er nú hava vit jú tvær brennistøðir, ið slítast niður, og saman høvdu vit nokk kunna lyft trupulleikan betri. Men sum er nú, so verður bert talan um samstarv við IRF, vísir Elin Lindenskov á.

## Má loysast

Nógvir møguleikar verða kannaðir, men í løtuni dugir Elin Lindenskov ikki at siga, hvør loysn verður vald.

- Vísir tað seg soleiðs, at tað er skilabest at keypa ein bil afturat, skal tað sjálvandi gerast. Men arbeitt verður við málinum, og henda uppgávan skal loysast. Tórshavnar Kommuna skal megna at lyfta hesa uppgávuni, leggur Elin Lindenskov dent á.

Inntil ein varandi loysn er funnin á hesum trupulleikanum, heldur verandi gongd fram, og spurningurin er bert um tíð, áðrenn trupulleikin veruliga gerst sjónligur kring um í Tórshavnar Kommunu.